FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 17. februar 2026
J. nr.: 26/03166

Svar uppá fyrispurning nr. 52-083/2025 frá Karlot Hergeirsson, løgtingsmanni, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, um at broyta ferðaætlan til Nólsoyar

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann Teistin á nólsoyarleiðini sigla eftir somu, ella nærtil somu ferðaætlan, sum Sam hevur á kalsoyarleiðini, uttan hetta gongur út yvir hvílutíðina?
2. Hvat hevði tað kostað í eyka útreiðslum til olju og annað hjá Teistanum at siglt eftir somu, ella nærtil somu ferðaætlan sum Sam, um Nólsoyarfjørð?
3. Finst fígging til svar til spurning 2 á verandi fíggjarlóg, um man hyggur, hvat eigur at vera útyvir á kalsoyarleiðini, nú tá ikki bæði Teistin og Sam eru á leiðini?

Svar til spurning nr. 1:
Tað ber til at seta Teistan á nólsoyarleiðina at sigla eftir somu, ella nærtil somu, ferðaætlan, sum Sam hevur á kalsoyarleiðini.

Strandferðslan hevur upplýst, at við smærri tillagingum ber til at sigla á nólsoyarleiðini eftir galdandi vetrarferðaætlan á kalsoyarleiðini. Orsakað av, at siglingartíðin á kalsoyarleiðini er umleið 20 minuttir hvønn vegin og á nólsoyarleiðini umleið 30 minuttir hvønn vegin, er neyðugt, at seinasta fráferðin í ferðaætlanini av Havnini verður flutt fram til kl. 21:45.

Skal summarferðaætlanin á kalsoyarleiðini setast í verk á nólsoyarleiðini, merkir tað, at ein manning má setast afturat.

Sama er galdandi, um fleiri túrar skulu setast inn í verandi ferðaætlan á nólsoyarleiðini, um galdandi ásetingarnar um hvílitið og annað skulu haldast.

Svar til spurning nr. 2 og 3:
Um vetrarferðaætlanin á kalsoyarleiðini verður sett í verk um nólsoyarfjørð við Teistanum í sigling, er kostnaður til olju og annað áleið tann sami sum við verandi ferðaætlan á nólsoyarleiðini.

Verður summarferðaætlanin á kalsoyarleiðini nýtt á nólsoyarleiðini alt árið, eru eyka útreiðslurnar til olju og annað áleið 700 tús.kr. Harumframt skal ein manning setast afturat.

Mettur kostnaður av hesum er 5-6 mió. kr. um árið, harav tað mesta er til lønir. Játtanin hjá Strandfaraskipum Landsins røkkur ikki til hetta.

Tinganes, 17. februar 2026

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum